# Leiðslusamskipari til Føroya Shell

Sjónband 317774

Vit sóknast eftir starvsfelaga til eitt spennandi og fjølbroytt starv. Leiðslusamskiparin vísir beinleiðis til stjóran, og skal í høvuðsheitum taka sær av fylgjandi:

**Marknaðarføring**
Tú hjálpir sølu- og marknaðarleiðaranum at samskipa og avgreiða øll marknaðarføringsátøk felagsins. Tú hevur ábyrgd av okkara miðlaætlan, tú samskipar samstarvið við uttanhýsis veitarar og tryggjar, at øll raðfest marknaðarføringsátøk verða avgreidd sum ætlað.

**Rakstur**
Tú hjálpir rakstrarleiðaranum við samskipan og avgreiðslu av ymsum rakstrar- og fyrisitingarligum uppgávum. Samstundis hevur tú ábyrgdina av skeiðskalendaranum fyri øll 110 starvsfólkini hjá Føroya Shell.

**Umsiting**
Leiðslusamskiparin er eisini stjórnarskrivari hjá Shell, so tú hjálpir stjóranum og umsitigardeildini við samskipan og avgreiðslu av ymsum umsitingarligum uppgávum. Hetta kann t.d. vera prísbroytingar og prísútrokningar, dagføring av heimasíðu, innsavnan og tilrættalegging av tilfari til nevndina hjá Shell. Tú er skrivari á leiðslufundum, og hevur annars annað vanligt umsitingararbeiði um hendi.

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi og fjølbroytt starv í eini fyritøku, har nógvar spennandi broytingar henda í løtuni. Vit geva rætta persóninum góðar arbeiðstreytir, kappingarføra løn við eftirløn og førleikamennandi skeið. Tú fært møguleikan at tilrættaleggja starvið, arbeiðsdag og arbeiðstíð, so tað passar tær best – sjálvandi í samráð við stjóran. Starvið er eitt fulltíðarstarv, men um tú ynskir niðursetta arbeiðstíð, er eisini møguleiki til tess.

**Vit ynskja:**
Ein starvsfelaga við góðum yvirliti og góðum evnum innan samskipan, og vit vænta at tú trívist við støðugum avbjóðingum. Tú dugir væl við fólki, og tú hevur eitt lætt og fyrikomandi lyndi. Tú dugir væl at samskifta á bæði føroyskum og enskum, og hevur tú eina hóskandi útbúgving og royndir innan samskipan, er tað ein fyrimunur.

**Umsóknin**
skal sendast til Shell, Vestara Bryggja 10, FO 110 Tórshavn, ella til hendrik@shell.fo innan 24 januar kl 10.00. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Hendrik Egholm, stjóra, á telefon 347410/215939, ella á omanfyristandandi teldupostadressu. Tú byrjar so skjótt tilber, tó ikki seinni enn 1. mars.

www.shell.fo

## Eg biði um tína atkvøðu

- Undirsjóðartunnilin fremjast í verki
- Tann besta skúlan og eitt trygt heilsuverk
- Rentustuðulin varðveitast
- Útjaðarin tryggjast betri kor
- Fastlønartrygd til flakafólkið
- Inntøkutrygd fiskimanna
- Verja tey kristnu virðini



## Gerhard Lognberg

SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperative

# Stjóri til VR-Bilar

Fyri VR-Bilar verður søkt eftir stjóra at byrja skjótast til ber.

### Um VR-Bilar
VR-Bilar umboða persónbilamerkini Volvo, Renault og Chevrolet. Virksemið fevnir um sølu av nevndu merkjum og rakstur av verkstaði.

Í felagnum starvast umleið 15 starvsfólk.

### Starvið
Stjórin skal hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni av VR-Bilum við ávísing til nevndina.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

### Umsøkjarin
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- dugir væl at samskifta við kundar
- hevur praktiskan kunnleika til roknskap og fíggjarviðurskifti
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevnir

Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur leiðsluroyndir.

### Umsóknir
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f í seinasta lagi 22. januar 2008.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 45 ella 23 34 84.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SPEKT statsaut. revisorar Spf.
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefaks 34 34 35

Heiðavegur 15
Postsmoga 190
600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefaks 474 475